## Søkt verður eftir Pedagogi

til at vera stuðul hjá barni í fyrsta flokki 20 tímar um vikuna, í Frítíðarskúlanum í Runavíkar kommunu, fram til 30-06-07. Frítíðarskúlin heldur til í gomlu læknahúsinum á Heiðavegi 22 Saltangará.

**Vit ynskja at umsøkjarin :**
- er íðin nærlagdur og álítandi
- dugir at samstarva við foreldur og arbeiðsfelagar
- hevur umsorgan og virðing fyri børnum og foreldrum
- dugir at taka støði í tørvinum hjá tí einstaka barninum
- er opin fyri avbjóðingum

Starvið verður sett 1. mars 2007.

**Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.**

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við leiðaran á tlf. 448594 lok.12 ella 216630.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum, skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 21. februar 2007 kl.12.00.



**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
600 Saltangará

---

**Mentamálaráðið**
MENTAMÁLADEILDIN

## EINALÆRARI Í HOVS SKÚLA

Starvið sum einalærari í Hovs skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. mars 2007.

**Um starvið**
Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur meginpartin av undirvísingini í skúlanum. Starvið er fulltíðarstarv, og í hesum skúlaári eru seks næmingar í Hovs Skúla.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- skal skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- skal eggja næmingum og foreldrum til at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- hevur hugsjónir um skúlamenning, og hvussu hon verður sett í verk.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Hovs skúla. Tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 21.2, 23.2, 23.3, 23.4, 25.4, 27.4 og 30.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag um, hvussu lærarastørv verða flokkað og lønt.

**Umsóknir**
Umsóknirnar skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 14. februar 2007 kl. 16.00.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

---



**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum**
FO-370 Miðvági · TLF 332 600 · FAX 333 604

**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum søkir:**

## Frítíðaravloysarar

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum/heilsurøktarum/sjúkrahjálparum og heilsuhjálparum í tíðarskeiðinum 1. juni til 31. august 2007.

Umsóknarfreistin er 16.marts 2007

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran á tlf. 332600/223600.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi, viðmælum o.t. skulu sendast til:

**Ellis-& Avlamisheimið í Vágum**
Att.: Leiðarin
370 Miðvágur

---

**Mentamálaráðið**
YRKISDEPILIN

## SKRIVSTOVUFÓLK

**Starvið**
Fulltíðarstarv sum skrivstovufólk er leyst at søkja í Mentamálaráðnum.

Talan er um eitt áhugavert og fjølbroytt starv í Yrkisdeplinum við møguleikum fyri fakligari og persónligari menning við skiftandi uppgávum.

**Arbeiðsøki**
Í høvuðsheitum at arbeiða við øllum vanligum fyrisitingarligum uppgávum og at hava skrivligt og munnligt samskifti við viðskiftafólk, t.e. lærupláss, lærlingar, yrkisskúlar, yrkisnevndir og onnur innan arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarøkið.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjari:
- Hevur handilsskúlaútbúgving og royndir í skrivstovuyrkinum ella aðra javnsetta útbúgving og royndir,
- hevur góðan teldukunnleika og kunnleika til mál, serliga føroyskt, og
- hevur góð samstarvsevni og førleika at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar – og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Setanarøkið fevnir um alt stjórnarráðið og tess stovnar.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

Yrkisdepilin
Postrúm 3279
FO-110, Tórshavn

ella sum teldupostur til: peturoh@yrkisdepilin.fo

Umsóknir skulu vera Yrkisdeplinum í hendi í seinasta lagi 23. februar 2007, kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Upplýsingar um virksemið hjá Yrkisdeplinum eru at finna á heimasíðuni: www.yrkisdepilin.fo

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðara, tlf. 555066.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Yrkisdepilin** er ein sjálvstøðug fyrisiting í Mentamálaráðnum, sum fyrisitur arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarmál, herundir at vera fyrisiting hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum. Yrkisdepilin fyrisitur eisini ávís viðkomandi málsøki fyri Mentamálaráðið, herundir at avgreiða ferða- og lønarendurgjald til lærupláss o.l.

Sosialurin
www.sosialurin.fo